**Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 3 nýggjar verkætlanir av játtanini til Fiskivinnuroyndir 2022.**

Hesa ferð komu 20 nýggjar umsóknir inn. Harafturat vóru 9 verkætlanir sum áður høvdu fingið tilsøgn um framhald eftir 2021. Stýrið fyri Fiskivinnuroyndir hevur viðgjørt umsóknirnar. Umsóknirnar eru viðgjørdar við støði í innkomna tilfarinum eins og endamálsorðingini í stevnuni fyri Fiskivinnuroyndir, sum er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum. Raðfest øki eru royndarveiða og virðisøking av fiski, burðardyggur fiskiskapur, búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum.

Við støði í, at játtanin til fiskivinnuroyndir varð munandi lækkað, og tað samstundis vóru umsóknir sum høvdu fingið tilsøgn um framhald, vóru einans tkr. 1.250 tøkar at játta nýggjum umsóknum í 2022. Stýrið mátti tí raðfesta umsóknirnar og eisini umsóknir, sum í prinsippinum vóru stuðulsverdar, máttu sýtast.

Endaliga niðurstøðan varð at stýrið innstillaði til landstýrismannin at 3 nýggjar verkætlanir skuldu stuðlast og at tær 9 sum áður hava fingið tilsøgn um framhald, verða stuðlaðar.

Tær tríggjar verkætlaninar sum hava fingið játtaðan stuðul eru vístar í talvuni niðanfyri.

| **Heiti á verkætlan** | **Felag / stovnur** | **2022** | **2023** | **2024** |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| MSC góðkenning av fleiri fiskasløgum | Faroe Islands Sustainable Fisheries | 450 | 450 | 450 |
| Taraskógir sum uppvakstrarøki | Havstovan | 500 | 250 | |
| Alt í land | JFK Trol | 300 | 300 | |

Tær 9 sum fáa játtað framhald eru vístar í talvuni niðanfyri.

| **Heiti á verkætlan** | **Felag / stovnur** | **2022** | **2023** | **2024** |
|---|---|---|---|---|
| | | t.kr. | t.kr. | t.kr. |
| Frystiturking | NAD Seafood | 200 | | |
| Maskinskering av svartkjafti | Varðin Pelagic | 300 | 300 | 300 |
| Reyðæti | Havstovan | 250 | | |
| Reyðsprøka og tunga | Havstovan | 400 | 400 | 400 |
| Stock e DNA | Havstovan | 250 | | |
| Roykturuppsjóarfiskur uttanlands | Sjógæti | 300 | 300 | |
| Føroysk hýsa til Stórabretlands | Kósin | 300 | | |
| Fiskiskapur eftir reyðæti í Bankarennuni | Mót | 300 | 300 | |
| GP Góðska Pelagisk | Varðin Pelagic | 350 | | |